# JAVNAÐARFLOKKURIN á Fólkatingi



# Tvey ár á **borgini**

jaf.fo

# GREIÐ LYFTI – ÓVÆNTAÐUR SIGUR

Tá tað púra óvæntað eydnaðist Javnaðarflokkinum at vinna sess á fólkatingi í 2011, var tað við greiðum og ítøkiligum vallyftum.

## VIT LOVAÐU AT:

1) røkja starvið fulla tíð

2) umboða allar føroyingar og samstarva við allar viðkomandi partar

3) ikki draga innlendis føroyskt klandur niður til Danmarkar

4) upplýsa um Føroyar

5) siga nei til bæði konfrontatión og undirbrotligheit mótvegis donskum myndugleikum, og í staðin leggja dent á dialogin

6) ávirka donsku stjórnina í stríðnum við ES

Síðani hava vit hvønn dag arbeitt við at fremja hesi lyfti í verki.

# Full tíð – og nógv mál

Javnaðarflokkurin er sjálvstøðugur flokkur á fólkatingi. Arbeiðið verður lagt til rættis í samráð við flokseiðsluna í Føroyum, og samstarvað verður eftir tørvi við onnur - serliga grønlendsku umboðini, donsku sosialdemokratarnar og hin føroyska fólkatingslimin.

Fólkatingsmaðurin og ein ráðgevi eru í fullum starvi, og í løtuni arbeiða fýra studentar tveir dagar um vikuna hvør.

Hetta ger, at vit kunnu vera virkin á nógvum økjum, og taka nógv mál upp.





# GREIÐ KRØV OG GREIÐ UMBOÐAN
## Í MAKREL- OG SILDASTRÍÐNUM


DR dk | NYHEDER | TV | RADIO | ME

Nyhedsoverblik | Politik | Sport | Kultur | Viden | Lev Nu | Regionalt

31. JUL. 2013 KL. 15:12

**Regeringen under pres for at støtte Færøerne**

Regeringen har risikeret at miste parlamentarisk støtte fra færøsk folketingsmedlem.

PRINT

DEL ARTIKLEN:

MAIL

TWITTER

FACEBOOK

Af **Morten Frandsen**

EU har i dag vedtaget at indføre sanktioner mod Færøerne, så færøske silde- og makrelfiskere ikke må sælge deres fisk i EU's havne, herunder i Danmark.

Danmark stemte imod sanktionerne. Ifølge Fødevareministeren fordi Danmark tager "udstrakt hensyn" til Rigsfællesskabet med Færøerne. Men nu viser det sig, at regeringen også har haft en parlamentarisk trussel hængende over hovedet i sagen.

For det færøske folketingsmedlem Sjurour Skaale har truet med at trække sin støtte til den danske regering, hvis regeringen havde stemt for sanktionerne.






Javnaðarflokkurin hevur, sum treyt fyri stuðlinum, sett donsku stjórnini greið krøv um Danmarkar støðu í stríðnum millum Føroyar og ES. Danska støðutakanin og samstarvið millum danskar og føroyskar myndugleikar hevur higartil verið nøktandi, og tí stuðla vit framvegis stjórnini.

Vit hava umboðað føroysk sjónarmið í viðgerðum á fólkatingi og í miðlunum. Hetta er gjørt í samráð við føroyskar myndugleikar til tess at tryggja, at føroyingar tala við somu rødd.









NØKUR AV MÁLUNUM

# Samstarv um og peningur til film í Føroyum

SAMAN VIÐ KLIPPFISK HAVA VIT FINGIÐ Í LAG GEVANDI SAMSTARV MILLUM DANSK FILMINSTITUT OG FØROYSKAR FILMSFRAMLEIÐARAR, OG SÍÐANI SETT GONGD Á AT SØKJA ÚTLENDSKAR GRUNNAR UM PENGAR TIL FØROYSKAN FILM.

# Føroysk bankatrygd

Fíggjarmarknaðurin í Danmark skal umleggjast, so teir størstu bankarnir ikki skulu kunna fara á heysin. Avtalað er, at umleggingin skal kunna fevna um føroysku bankarnar, um vit ynskja tað.



# Tryggjað játtan til Norðurlandahúsið



Í ár ætlaðu sterkar kreftir at skerja játtanina til Norðurlandahúsið við fleiri milliónum. Í Norðurlandaráðnum fingu vit - við góðari hjálp frá fólki í Norðurlandahúsinum - donsku delegatiónina, mentanarnevndina og sosialdemokratiska bólkin at mæla frá hesum. Onnur føroysk umboð í Ráðnum gjørdu eisini sítt. Og tað eydnaðist.

# Varðveitsla av gomlum býlingi í Porkeri

Í samstarvi við Porkeris Fornminnafelag hava vit upplýst uttanlands um arbeiðið at varðveita gamla býlingin í Eystrum í Porkeri, og sett gongd á at søkja útlendskan stuðul til hesa verkætlan.





# Stórt endurgjald til føroyingar

Fólk, sum frá 1998 til 2011 búðu í Føroyum men arbeiddu í Danmark, rindaðu í mongum førum av órøttum 8% í donskum arbeiðsmarknaðargjaldi. Vit fingu stjórnina at ásanna hetta, og á vári 2013 bleiv ein beinleiðis telefonlinja til SKAT í Danmark latin upp, sum hesi fólk kundu ringja til. Nógv hava fingið endurgjald.

# Stuðul til einstaklingar og feløg




Ein stórur partur av arbeiðinum snýr seg um at hjálpa einstaklingum, feløgum og virkjum við ítøkiligum trupulleikum – ikki minst uppihalds- og innferðarloyvum. Í fleiri førum hevur tað gjørt avgerandi mun.

# Norðurlendsk barnabókavirðisløn

Til tess at styrkja felags norðurlendska samleikan, hava vit í Norðurlandaráðnum saman við øðrum virkað fyri, at ein norðurlendsk barnabókavirðisløn verður sett á stovn. Hon fer nú at verða latin.

# Yvirtøka av kirkjubíbliuni



Vit samstarvaðu við føroyskar myndugleikar, tá rættindini til føroysku kirkjubíbliuna vórðu flutt til Føroya.

# Fosfat í saltfiski

Vit hava – í samstarvi við Vinnuhúsið, Dansk Fisk og donsku stjórnina – strongt á at fáa strikað ES-forboðið móti at nýta fosfat í saltfiskaframleiðslu. Forboðið var ein stórur vansi fyri føroyskar framleiðarar, tí vandaleysa fosfatið økir munandi um dygdina. Nú er forboðið strikað.



# JA til Evropa




Okkara vinnulív hevur aftur og aftur eftirlýst, at vit finna Føroyum eina trygga og nøktandi støðu mótvegis ES. Men vit eru framvegis tað landið í Evropa, sum hevur veikasta sambandið við okkara egna høvuðsmarknað.

Tað er ikki nøktandi sum er - og kann gerast hættisligt sum frá líður. Føroyar mugu siga ja til Evropa - spurningurin er bara hvussu tað skal gerast.

Tí gjørdu vit eina frágreiðing um ES, har tað m.a. verður lýst hvussu onnur smá lond hava skipað seg í mun til samveldið. Eisini skipaðu vit fyri fleiri kjakfundum um evnið.






Ålandstidningen tisdagen den 16 oktober.

Ålandstidningen onsdagen den 17 oktober.

Här är gåvobrevet från 1971.

**Färingar studerar åländskt exempel**

**Färöarnas folketingsledamot Sjúrdur Skaales är på Ålandsbesök.**

**– Jag är här bland annat för att studera hur Åland så framgångsrikt skötte sina förhandlingar med EU, säger han.**

NORDEN Sjúrdur Skaales är en av Färöarnas två ledamöter i danska folketinget. Färöarna tillhör Danmark men har en långtgående självstyrelse med egen lagstiftning, egen beskattning och egen förhandlingarätt med andra nationer i fråga om fiske och handelsavtal.

Färingarna vill inte att Färöarna går med i EU. Orsaken är fisket som är öns ekonomiska och kulturella hjärta.

– Inom EU är fiskepolitiken centralstyrd. Vi skulle tappa kontrollen över vårt eget vattenområde.

Island förhandlar som bäst om att medlemskap i EU.

– Det sätter press oss eftersom vi riskerar att bli isolerade på ett helt nytt sätt.

Med Island med i EU blir Färöarnas fiskevatten omslutet av unionens. Också för Island är ett bra fiskepolitiskt avtal grunden för ett medlemskap, säger Sjúrdur Skaales.

Färöarnas folketingsledamot Sjúrdur Skaales och Harry Jansson känner varandra väl från arbetet i Nordiska rådet.

**Bra exempel**

Sjúrdur Skaales betraktar Ålands förhållande till EU som bra exempel på vad Färöarna eftertraktar.

– Åland skötte sina förhandlingar själva. Ni fick igenom praktisk taget allt ni ville ha, utom en plats i parlamentet.

Harry Jansson, som är Sjúrdur Skaales värd under besöket, var en av Ålands två EU-förhandlare i början 1990-talet.

– Vi vill dela med oss av 20 års erfarenhet. Berätta hur vi lade upp förhandlingarna, att man måste sätta höga målsättningar och vara riktigt försiktig med detaljerna. För det är i dem som han herrn där nere sitter, säger Harry Jansson.

Till skillnad från Ålands självstyrelse är inte Färöarnas suveränitet folkrättsligt och konstitutionell skyddad.

– Även om Färöarna är friare är Åland mer skyddat. Och den bristen på formell självstyrelse kan bli problematiskt i EU.

Åland å sin sida kan lära sig av hur Färöarna förhåller sig till Danmark, påpekar Sjúrdur Skaales. Speciellt nu när arbetet med ramlagen intensifieras i riksdagen.

**Oljan lockar**

Även om fisket är grunden för Färöarna har oljan seglat upp som en möjlig framtida kassako. Efter att ha försökt sig på sex ganska magra oljekällor provborrar Statoil just nu på en sjunde plats som ser ut att kunna innehålla en enorm oljereserv, en så kallad "stor elefant".

– Visst hoppas vi alla på det, men är samtidigt nervösa. Med stora naturresurser kommer risk för korruption. Men oljan gör oss ju mer attraktiva för EU.

Oljerättigheterna är för övrigt det enda området som fått samarbetet mellan Danmark och Färöarna att gnissla.

– Det blev en strid på 17 år som dock slutade med att Danmark böjde sig. Oljerättigheterna är Färöarnas.

PETTER LOBRÅTEN

## ES og føroysk fiskivinna

Størsta orsøkin til, at Føroyar ikki eru nærri knýttar at ES, er felags fiskivinnupolitikkurin hjá samveldinum. Men hvat er veruleikin og hvat eru fordómar um henda politikk? Og hvør hevði ítøkiliga avleiðingin verið, um Føroyar blivu partur av honum? Tað lýsa vit í einum framhaldi av bókini um ES og Føroyar.




# ÚSUN

Tað hevur verið tosað um at umleggja stuðulin, sum vit lata lesandi uttanfyri norðurlond, so hann verður lán í staðin. Men hvørja ávirkan hevur hesin stuðul fyri lestrarvalið hjá ungum? Og hvat er sambandið millum hesi fólk og føroyska samfelagið? Tað hava vit kannað og lagt fram, soleiðis at avgerðin um hetta kann takast á upplýstum grundarlag.




# Hvat vita og halda danir um Føroyar?

**Hvat vita danir um Føroyar og føroyingar? Hvat halda teir um okkum? Og hevur ríkisfelagsskapurin nakran týdning fyri teir? Tað hava vit gjørt eina stóra kanning um - og hon gav okkum høvi til í donskum miðlum at afturvísa mest vanligu misskiljingini: Nevniliga at Føroyar eru ein fíggjarlig byrða fyri Danmark.**

# Hvussu skatta vit í mun til onnur?




Skattur er konstant á politisku dagsskránni. Men hvussu skatta vit í Føroyum samanborið við onnur lond? Hvat skatta vit - og hvat skatta vit ikki? Og hvønn hugburð hava føroyingar til skatt samanborið við onnur? Hetta settu vit nøkur lesandi at lýsa.


6 DANMARK

Danskere tror, Færøerne får milliarder

jaf.fo

# MENTANARLIG OG SOSIAL TILTØK

Vit hava havt nógvar vitjanir, skipað fyri eini røð av tiltøkum, og hildið nógvar fyrilestrar um Føroyar - bæði í Danmark og øðrum londum.

















